**Fylgiskjal: Samskifti um tilseting av maskinum**

Góði Poul Geert,

Fyri at svara hesum, havi eg vent mær til Arna Debess Madsen, fyri at fáa greiðu á, hvat hvørt av hesum punktunum merkir. Síðan havi eg  vent mær til okkara deildarleiðara innan tøkni, so hann kann meta um, hvat er neyðugt nú og hvat kann bíða. Deildarleiðarin metir, at nøkur av punktunum kunnu bíða til páskaferiuna, meðan onnur mugu koma við nú.

Vit klára at gjøgnumføra undirvísing fram til páskaferiuna, um vit bíða við fylgjandi punktum, tó má eg leggja áherðslu á, at vit kunnu ikki bíða við punktunum longur enn til páskaferiuna.

Punkt, sum vit kunnu bíða til páskir við eru:

- Tilseting og fundament til dieselmotor til verkstað: kr. 150.000
- Tilseta maskinur og ventilatión til verkstað: kr. 250.000
- Tilseta maskinur í timbur: kr. 500.000
- Tilseta maskinur á verkstøðum – EL: kr. 150.000. Her eru nakrar íbindingar, sum kunnu bíða, meðan aðrar hasta meira, t.d. hasta fresararnir
- Tilseta maskinur á verkstøðum – HVS: kr. 150.000. Her eru nakrar íbindingar, sum kunnu bíða, meðan aðrar hasta meira, t.d. hasta fresararnir

Punkt, sum ikki kunnu bíða eru:

- Fyribils íbindingar av maskinum og ventilatión: kr. 250.000. Her eru nógvar smærri tillagingar, sum skulu til fyri at maskinurnar á verkstøðunum kunnu brúkast.
- Tilseta maskinur á verkstøðum – EL: kr. 550.000. Her eru nakrar íbindingar, sum kunnu bíða, meðan aðrar hasta meira, t.d. hasta fresararnir
- Tilseta maskinur á verkstøðum – HVS: kr. 650.000. Her eru nakrar íbindingar, sum kunnu bíða, meðan aðrar hasta meira, t.d. hasta fresararnir
- Tilseta innbúgv í køkinum: kr. 50.000. Her er serliga talan um hurðarnar, sum skilja køkin frá kantinuni. Hetta hastar nógv, tí í dag er opið millum køk og kantinu.

Sum tú sært, eru tvey punkt, sum ganga aftur bæði í tí, sum kann bíða og tí, sum ikki kann bíða. Grundin er, at nakað av hesum arbeiðinum kann bíða, meðan annað ikki kann bíða.

Vinarliga,
Bogi

**From:** Poul Geert Hansen <PoulGeertH@mmr.fo>
**Sent:** 22. november 2018 15:16
**To:** Bogi Bech Jensen <bbj@glasir.fo>
**Subject:** Tilseting av maskinum

Góði Bogi,
Í sambandi við eykajáttanarumbønina til Glasir eru tilseting av maskinum merktar sum havandi stóran týdning. Sí listan niðanfyri.
Kanst tú siga, hvussu nógv hetta hastar og um tað er møguligt at bíða við hesum til ein nærri ráðlegging er gjørd av samlaða tørvinum? Ber tað til at undirvísa inntil í vár, uttan at hesar maskinum eru settar til?
PG

| | | |
|---|---|---|
| Tilseting og fundament til dieselmotor til verkstað | 150.000 | Er ikki við í projekt |
| Fyribils íbindingar av maskinum og ventilatión | 250.000 | Orsaka av at endaligu loysnirnar ikki vóru loystar |
| Tilseta maskinur og ventilatión til verkstað | 250.000 | Er ikki við í projekt |
| Tilseta maskinur í timbur | 500.000 | Nakrar maskinur mangla enn tilseting |
| Tilseta maskinur á verkstøðum - EL | 700.000 | Eykaarbeiði hjá LM electric, EL |
| Tilseta maskinur á verkstøðum - HVS | 800.000 | Eykaarbeiði hjá Demich. Trykluft, ventilatión v.m. |
| Tilseta innbúgv í køkinum | 50.000 | Er ikki við í projektinum |
| Íalt | | |